# Adina gekk fremst




Mynd: Álvur Haraldsen

**HONDBÓLTUR** Adina Petrea gekk fremst og stóð fyri 11 av málunum, tá Tjaldri rann Kyndil um koll. Nú er kvinnurnar úr Runavík nummar eitt

Uni Holm Johannesen

Tað hevur gingið við rúkandi ferð í Runavík seinastu vikurnar.

Tað sá einki út, tá Tjaldur fekk bara eitt stig burtur úr heimadystinum móti StÍF í november í fjør. Síðan Trygvi Mortensen loysti Bogdan Burcea av í venjarasessinum hevur liðið hinvegin av álvara fingið luft undir veingirnar.

Sigurin á Kyndil í gjár var tann sjeyndi upp í slag. Tað hevur somuleiðis við sær, at Tjaldur er nýtt oddalið í bestu kvinnudeildini.

### Avgreiðsluspurningur

Kyndil hevur staðið seg væl í dystunum móti Tjaldur fyrr í hesum kappingarárinum. Hesaferð var eingin slingur í valsinum.

Kvinnurnar úr Runavík vóru omaná allatíðina, og tær vunnu sær eina trygga leiðslu beinanvegin.

Tað var serliga Adina Petrea, sum stóð seg væl. Hon var sannførandi í sínum spæli, og tað riggaði serliga væl hjá henni í álopsspælinum. Hon stóð fyri 11 av málunum hjá heimaliðnum.

uni@sosialurin.fo

# Avgjørdu í seinastu løtu

**HONDBÓLTUR** Kvinnurnar úr Vestmanna vóru í mótburði í løtum av dystinum, men hóraðu undan og fingu tvey stig í botndystinum

Uni Holm Johannesen

Leiðslan hjá VÍF kom av álvara í vanda, tá kvinnurnar úr Vestmanna fingu fimm útvísingar seinastu løtuna.

Tað var tí alneyðugt, at Torgunn Johansen hevði neyðuga dirvi í seinasta minuttinum, tá hon tryggjaði VÍF bæði stigini.

Gestirnir úr VÍF vunnu 22-21 á StÍF.

Kvinnurnar av Strondum hava róð tungan sjógv í hesum kappingarárinum. Tær hava bara fingið eitt stig higartil. Leygardagin var nær við, men hinvegin øktist munurin bara upp til nærmasta kappingarneytan.

Heimaliðið legði væl frá landi og var á odda 5-0. VÍF kom skjótt aftur, men StÍF rann treyðugt aftaná. Annika Poulsen, VÍF, varð eisini útvíst í fyrra hálvleiki, tá hon steðgaði einum mótstøðuleikara, sum var á veg í skjótálop.

Tað vóru serliga Liljan Djurhuus, Torgunn Johansen og Elisa Ingebrigtsen, sum stóðu seg væl hjá VÍF. Tóra Seloy var ikki við vegna skaða.

VÍF hevur fingið seks stig í skjáttuna, og øll eru vunnin móti StÍF.

uni@sosialurin.fo




Mynd: Álvur Haraldsen

# Settu ferðina upp seinastu løtuna

**HONDBÓLTUR** Tað var ikki fyrr enn Barbara Brauer varð útvíst, at Neistin av álvara tók sær um reiggj. Í heimadystinum móti VB øktu neistakvinnurnar um munin úr trimum málum til 11 mál seinastu løtuna

Uni Holm Johannesen

Tað var brádliga í seinna hálvleiki, at heimaliðið fór til stroks. Neistin var á odda við trimum málum miðskeiðis í seinna umfarinum, men vann við heili 11 málum.

Tað var serliga í verjupartinum, at heimaliðið ansaði væl eftir hesa løtuna. Gestirnir úr Vági spældu seg sjáldan ígjøgnum seinastu løtuna, og tá Neistin fekk gott pláss í álopsspælinum, kundi valla ganga øðrvísi.

### Brauer útvíst

Barbara Brauer hevur verið stóra stjørnan hjá Neistanum í hesum kappingarárinum. Hon hevur verið sera sannførandi í álopsspælinum og verjuspælinum hjá høvuðsstaðarliðnum seinastu mánaðirnar.

Hon varð útvíst, tá seinni hálvleikur var sjey minuttir gamal. Hon var ov harðliga í verjustøðu, og dómararnir vístu henni av vøllinum.

Tað tóktist sum, at fráveran hjá Brauer setti ferð á hinar. Í øllum førum tóku neistakvinnurnar ábyrgd og runnu undan gestunum. Stríðsviljin var framúr seinastu løtuna.

Tað riggaði serliga væl seinastu løtuna. Neistin var á odda við trimum málum, men vann við ellivu málum.

Orsøkin var serliga sannførandi verjuspælið hjá heimaliðnum, men VB hevði heldur ikki neyðuga tolið og framdi hinvegin fleiri óneyðug mistøk.

## Sunset Deildin Kvinnur

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tjaldur | 13 | 371 | 293 | 78 | 21 |
| 2 | Neistin | 13 | 360 | 298 | 62 | 21 |
| 3 | Stjørnan | 12 | 359 | 284 | 75 | 20 |
| 4 | VB | 13 | 308 | 323 | -15 | 11 |
| 5 | Kyndil | 13 | 317 | 322 | -5 | 10 |
| 6 | VÍF | 13 | 298 | 364 | -66 | 6 |
| 7 | StÍF | 13 | 241 | 370 | -129 | 1 |